# VITAN, VERULEIKI OG VISJÓN

## – SKÚLIN SUM SLÓÐBRÓTARI

## SKRÁ

Kl. 8.30 Koma og kaffi v.m.

Kl. 9.00 Vælkomin
Rigmor Dam, landsstýriskvinna, setir ráðstevnuna

***Ástøðiligi parturin***

Kanningin um happing í tølum og fyribrigdum
*Katrin av Kák, sálarfrøðingur og námslektari á Fróðskaparsetrinum og*
*Olga Biskupstø, samfelagsfrøðingur og námslektari á Fróðskaparsetrinum*

Spurningar

Hvat halda næmingar um happing? Videobrot frá evnisdegnum

Nýggj hugtøk um happing
*Dorte Marie Søndergaard, prof. í sosialsálarfrøði, Danmarks Pedagogiska Universitet*

Spurningar

Kl. 11.00 Steðgur

Kl. 11.25 Hvat halda næmingar um happing? Videobrot frá evnisdegnum

Happing og skúlafloksmentan
*Helle Rabøl Hansen, løgfr. og phd. í námsfrøðiligari sálarfrøði, Danmarks Pedagogiska Universitet*

Spurningar

Kl. 12.25 Døgurði

***Verkligi parturin***

Kl. 13.15 Hvat er ein góð trivnaðarætlan sæð frá sjónarhorni "Heim og Skúli"
*Annika Sølvará, forkvinna í Heim og Skúli*

"Parentesmetodan" og introduksjón til arbeiðsbólkarnar
*Helle Rabøl Hansen*

Kl. 14.00 Arbeiðsbólkar

Kaffi verður í stovunum, har arbeiðsbólkarnir arbeiða

Kl. 15.00 Samanumtøka av ástøðiliga og verkliga partinum. Hvør skal kósin vera?
Fyrilestrahaldarar saman við orðstýrara o.ø. taka samanum

Kl. 15.20 Rigmor Dam, landsstýriskvinna endar

Kl. 15.30 Endi

*Orðstýrari: Birgir Kruse, ritstjóri*

## ENDAMÁL VIÐ RÁÐSTEVNUNI

**AT** varpa ljós á nýggjastu kanningina um happing í fólkaskúlanum. Lýsa og grundgeva fyri ástøðini handan kanningina, kortleggja happing í tølum og fyribrigdum, sum næmingar siga frá.

**AT** varpa ljós á feska altjóða gransking innan happing. Hvørji rák gera seg galdandi nú, hvussu verður happing fatað aðrastaðni, og hvat krevur tað av skúlanum?

**AT** skapa eina felags endurskoðaða fatan av happing. Seta spurningar við og gruna yvir, hvussu nýggja vitanin skal vera viðvirkandi til broytt virki í arbeiðnum at fyribyrgja og basa happing. Hvussu skulu vit brúka endurskoðaðu fatanina í skúlanum?

MENTAMÁLARÁÐIÐ